| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. februar 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 27. februar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 20. februar 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Jann Toftegaard
Símun Jákup Eliassen

Jann Toftegaard møtti sum varalimur fyri Birgir Petersen og Símun Jákup Eliassen sum varalimur fyri Sigurð S. Simonsen, sum báðir høvdu forfall til fundin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 05/2014.**

**Umsókn frá Føroya keypsamtøku um byggiloyvi til handilsbygning.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Ann Fuglø, byggifrøðingi og NH betong SP/F, dagfest 18. februar 2014, har vegna Føroya keypsamtøku verður søkt um byggiloyvi til nýggjan FK handil á matr. nr. 239af í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Talan er um bygging á økinum sunnan fyri Kato oman á kappróðrarneystinum og nakað suður.

Føroya keypsamtøka hevur viðgjørt hetta mál á fundi 04. desember 2013, har avgerð varð tikin um at byggja nýggjan handilsbygning, somuleiðis sum býráðið á fundi tann 12. desember 2013 tók avgerð um at geva FK. prinsipiellt byggiloyvi til bygningin, hetta sambært tilmæli frá teknisku nevndini.

ÍF kappróður hevur sett fram ynski um, at felagið kann fáa umleið 57 m2 av kjallaranum til teirra virksemi.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 18. februar 2014 og mælir ein meiriluti Magnus S. Midjord og Birgir Petersen býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti.

Birgir Petersen heitti á býarverkfrøðingin um at seta fyrispurning, um bygningurin er dimentioneraður til at bera eina hædd omaná.

Minnilutin Sigurð S. Simonsen helt, at verandi samtyktir mótvegis SP/F Í Støð og Kato eiga at verða settar úr gildi, so ruddað verður upp í gomlum samtyktum.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 18. februar 2014 og mælir nevndin einmæld býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til hesa bygging sambært fyriliggjandi projekti, soleiðis at dururin við høvuðsgongina og trappan úr sunnara enda verða tillagaðar umstøðunum á staðnum pg í samráð við kommununa.

Brunatekningar skulu verða góðkendar av teknisku deild, áðrenn byggiloyvi verður útskrivað.
Viðvíkjandi meirkostnaðinum av hølunum hjá ÍF kappróðri, so verður hetta mál beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Meðan málið varð viðgjørt var Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Avgerð:**
Mótuppskot frá Eyðuni á Lakjuni. Mælt verður til, at býráðið heldur fast við ta ætlan, sum hevur verið frammi, at á økinum, talan er um, verða bygdir 2 íbúðarblokkar við íalt umleið 15 íbúðum. Atkvøtt varð fyrst um mótuppskotið, sum fall. (2 atkv. fyri, 5 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Ímóti atkvøddu

Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Sigga Óladóttir Joensen og Árant Berjastein. Blankt atkvøddi Jann Toftegaard).

Atkvøtt varð síðan um uppskotini frá meirilutanum í vinnunevndini og teknisku nevndini um at geva Føroya keypsamtøku byggiloyvi til handilsbygningin. Tilmælini vórði samtykt (5 atkv. fyri og 3 atkv. blankar. Blankt atkvøddu Eyðun á Lakjuni, Jann Toftegaard og Símun Jákup Eliassen).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin var Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 06/2014.</u>**

**Umsókn frá P/F Pelagos um byggiloyvi til uppisjóvarmatvøruvirki.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá EN ráðgeving, dagfest 19. februar 2014, har teir vegna P/F Pelagos biðja um ávegis byggiloyvi til nýtt uppisjóvarmatvøruvirkið á matr nr. 239ab í Fuglafirði.

Á býráðsfundi tann 03. februar 2014 varð samtykt at geva prinsippielt byggiloyvi at fara í gongd við hesa bygging, og í hesum sambandi verður víst til skriv kommununa dagfest. 04. februar 2014.

Kommunan hevur ikki viðmerkingar til húsalutalýsingina, dagf 19.02.2014, yvir ætlaða tilfarsnýtslu til sokallaða "*ráhúsi*" til uppisjóvarvirkið hjá Pelogos í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á felags fundi millum vinnu- og teknisku nevndirnar tann 25. februar 2014, og mæla nevndirnar býráðnum til, at ávegis byggiloyvi verður givið til sjálvt "*ráhúsi*" samb. fyriliggjandi umsókn og tekningar dagfestar 19.02.2014.

Í sambandi við endaligu málsviðgerðina, skulu fyriliggja neyvari tekningar og skjalaprógv fyri, at húsalutir í húsalutalýsingini standa tær lýstu brunaligu dygdirnar, eins og haldførið skal lýsast viðvíkjandi berandi húsalutum annars.

Somuleiðis skal lýsast neyvari um innrætting, rýmingarviðurskifti, innanhýsis gonguleiðir, brunavarnar- og ávaringarskipanir og annað viðvíkjandi fólkatrygdini.

Til tess at lata nýtsluloyvi samb. § 13 stk. 1 í byggilógini skal kommunan umframt hava og góðkenna eina rakstrar- og viðlíkahaldslýsing fyri virksemið og handfaringina av øllum bygninginum.

Sløkkiliðið og kommunan skulu hava fulla kunning um vandamikil evni og átaksatlit í hesum sambandi.

Í sambandi við ávegis byggiloyvi verður víst til § 10, stk. 3 í løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá vinnunevndini og teknisku nevndini um at geva P/F Pelagos ávegis byggiloyvi til bygging av nýggjum uppisjóvarmatvirki á matr. nr. 239ab á havnarøkinum. (5-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin vórðu Sigga Óladóttir Joensen, Eyðun á Lakjuni, Jann Toftegaard, Símun Jákup Eliassen og Jákup Frants Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 07/2014.</u>**

**Leigusáttmáli millum kommununa og P/F Pelagos á havnarøkinum.**

Vinnunevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 10. Februar 2014 um leigusáttmála millum kommununa og P/F Pelagos fyri lendi matr. nr. 239ab á Enninum sunnan fyri Begfrost og niðan fyri olju- og lýsitangarnar.

Talan er um grundøki undir nýggja uppisjóvarmatvøruvirkinum.
Fyrisitingin hevur tann 06. Februar 2014 sent uppskotið til hoyringar, eitt nú hjá P/F Pelagos, og hevur Peter S. Holm tann 10. februar 2014 tosað við býráðskrivaran, har hann góðtekur fyriliggjandi uppskot.

Tó hevði hann viðmerkingar um, at fermeturleigan átti at verið prístalsviðgjørd, men hesum varð kommunan ósamd við, við tað at býráðið hevði góðtikið eina gjaldsskipan 2013-2017, har leiguprísir fyri lendi á havnarøkinum vórðu lýstir.

Uppskotið til leigusáttmála hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 18. Februar 2014 og mælir ein samd nevnd býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála millum kommununa og P/F Pelagos uttan viðmerkingar.

Nevndin hevur tann 25. februar 2014 fingið nakrar broytingar, sum P/F Pelagos ynskir at fáa í leigusáttmálan partanna millum. Mett verður, at hesar broytingar ikki hava nakrar avleiðingar fyri kommununa.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini tann 25. februar 2014, og mælir nevndin býráðnum til, at leigusáttmálin verður gjørdur við hesum broytingum.

Nevndin mælir eisini til, at seinasti setningurin í § 8 "burtursæð frá, at tá ið hetta er orsaka av óvanligum tíðum" verður strikað. Viðvíkjandi § 5, stk. 3 verður mælt til, at orðið felagið verður strikað.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini frá 25. februar 2014 og góðkenna leigusáttmálan millum kommununa og P/F Petagos við broytingum. (5-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin vórðu Sigga Óladóttir Joensen, Eyðun á Lakjuni, Jann Toftegaard og Símun Jákup Eliassen og Jákup Frants Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

## Mál nr. 08/2014.

**Um- og útbygging av miðnámsskúlunum á Kambsali**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Kontrast, dagfest 6. februar 2014, har teir vegna Mentamálaráðið og Landsverk søkja kommununa um byggiloyvi til út og umbyggina av miðnámsskúlanum á Kambsdali á mart. nr 871cl og 871h.

Í samband við viðgerð av hesum máli hevur býráðið gjørt neyðugar broytingar í byggisamtyktini, soleiðis at byggjast kann sambært fyriliggjandi projekt.

Uppskotið til broytingina hevur ligið frammi til møgulig mótæli og/ella broytingaruppskot. Í samband við framløguna fekk kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot.

Broytingin er nú til viðgerðar í Fiskimálaráðnum, og væntað vit teirra niðurstøðu ein av fyrstu døgunum.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. februar 2014, og verður mælt býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært fyriliggjandi projekti, soleiðis at tillagingar móti ánni verða loystar í samráð við kommununa og á ein slíkan hátt, sum kommunan kann góðtaka.

Treytin fyri byggiloyvinum er, at broytingin í byggisamtyktini verður gingin á møti av Fiskimálaráðnum.

**Avgerð:**
Samtykt var at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Eyðun á Lakjuni ikki á fundi vegna ógjegni.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Jann Toftegaard

Árant Berjastein

Símun Jákup Eliassen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen